
Ikki ólógligt longur

— Eg minnist enn, tá vit sum 17 ára gomul høvdu menniskjalæru í skúlanum, sigur spanski blaðmaðurin Oscar Cabarello í bók síni »Sex í Francotíðini«. Á tekningum av mannakroppunum vóru eingir kynslutir sjónligir.

Spaniólin heldur, at hetta hevur eina politiska orsøk. Hann sigur, at eingin stjórn hevur verið so fyri at fjala útyvir at ganga nakin og við harðskapi fjalt tann mest umráðandi partin av lívinum hjá menniskjum sum ein einræðisstjórn.

Nú — tvey ár eftir deyða Francos — sær hetta forboð út til at vera av, og ein verður ikki longur sektaður fyri at ganga nakin úti í náttúruni.



Nakin baðifólk á Ibiza

Spanska innanríkisráðið hevur givið nudistfeløgum loyvi at virka í Barcelona, Madrid, Ibiza og í Andalusiu. Fyri fyrstu ferð í 40 ár nýtast spaniólar ikki at fara uttanlands fyri at lata seg úr. Síðan 1939 hevur ein, sum gongur nakin, verið roknaður sum ein lógloysingur.

Tá tey fyrstu ferðamannafólkini komu í 60-unum, var eitt spurnartekin sett við lógina.

Gott fyri ófødd børn


Á Fórmenta flentu hippiarnir at sponsku politistunum, tá hesir lógu uppi í trøunum á heyggjum við baðistrendurnar og við kikara eygleiddu alla brúna húð, sum teir sóu. Yvirmenn teirra kundu antin geva teimum bót ella gjørdu teir, sum teir ikki vistu nakað, alt eftir hvussu lagið var.

Einaferð hevði ein genta við barn gingið nakin eftir strondini, og tá politistar tóku hana, segði hon, at læknin hevði biðið hana gera so. Hann hevði biðið hana fingið sær saltvatn á búkin og bróstini, tí tað skuldi vera so gott fyri barnið.

Hvørt summar hevði spanska politiið minst eina rannsókn móti naknum baðifólki á strondini. Sjálvt eftir deyða Francos hevur ein tílík verið.

Men nú er støðan so broytt. Einaferð vóru nakrir menn komnir við eini gentu, sum hevði baða nakin, fyri rættin. Dómarin hevði fríkent hana, men ákært teir, sum høvdu tikið gentuna, fyri at vera stigamenn (kiggere).





Millumleikur

Millumleikur — ein ólavsøka. Soleiðis kallar Marianna Debes Dahl bók sína, sum júst er komin út. Sum hon sjálv sigur um innihaldið snýr bókin seg um ungfólk av bygd, sum leita til Havnar ólavsøkuaftan. Ungfólkini, sum eita Bergur, Bára og Drós, eru øll spent, har tey ganga niðan eftir tí flaggskrýdda Áarvegnum. Hvat fara stevnudagarnir at bera teimum? Skemt? Stuttleika? Kærleika? Vónbrot?

Øll eru tey klókari, tá tey dagin eftir aftur stevna inn móti heimbygdini.

Bókin, sum er hálvthundrað blaðsíður til støddar, kostar 24 krónur. Tekningarnar, sum eru í bókini, hevur Jógvan Asbjørn Skaale gjørt, og Einars Offset hevur prentað.

Einasta sosialistiska tíðarritið á føroyskum

★ **Framin** avdúkar borgarligu dulsmálini og lygnirnar!

★ **Framin** viðger støðuna úti og heima út frá marxistiska klassasjónarmiðinum.

★ **Framin** er gott lóður í stríðnum móti borgaraskapi og øllum afurhaldi — fyri sosialismu og sjálvstýri!

★FRAMIN

FØROYSKT TÍÐARRIT FYRI SOSIALISMU OG SJÁLVSTÝRI

16. ÁRG. NR. 4 1978 LEYSASØLA 5,50

fiskivinna og samfelagsbroyting

afturhald og skúli

"okkara banki"

eind ella spjaðing

neutronbumban


tann lítla konan

alexandra kollontay

imperialistisk bjarging í Zair

FØLKAFLOKKURIN LETUR SEG ÚR. KLIPP ÚR GREININI:

»Roma mitt imot«.



DAGBLADIÐ Nr. 39 - 31. mei 1978

16 síður
10 ferðir
árliga

fyri einans 50 kr.!

Til frímerki

Undirritaði teknar seg sum haldara av blaðnum

FRAMIN

Tórgarðstrøð 7
3800 Tórshavn

Navn: _____

Bústaður: _____
